# Berserkagongd á tóm hús

*Eini sethús við Landavegin fingu ikki frið fyri ótangum, sum hava brotið næstan allar rútarnar. Síðani eru teir farnir innar og hava knúst alt innbúgvið, sum brótast kann*

Sveinur Tróndarson

Hósdagin fekk løgreglan í Havn boð um, at herverk var gjørt á eini hús við Landavegin í Havn.

Eingin býr í húsunum, so ótangarnir hava havt frið og náðir at gera tað teimum lysti, og teir eru farnir nágreiniliga til verka skilja vit á Súna Vinther, støðleiðara í Havn.

– Teir hava brotið so at siga allar rútarnar sum eru í húsunum, sigur Súni.

Ikki nóg mikið við, at rútarnir eru brotnir, tí aftaná eru ótangarnir farnir innar, og har hava teir knúst alt tað innbúgvið, sum knúsast kann, leggur Súni Vinther afturat.

Í løtuni stendur løgreglan í Havn á berum í hesum málinum, tí teir hava ikki frætt um nakran, sum hevur sæð tilburðin. Er nakar sum veit nakað at siga, ber til at boða løgregluni frá á telefon 311448.



*Stórur skaði er gjørdur á húsini*

*Bergur Berg, formaður í BFL:*

# – Heilt burturvið

*Formaðuri í Búskapar- og løgfrøðingafelagnum heldur, at viðmerkingarnar hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum vóru heilt burturvið. – Tær vóru persónligar og niðursetandi og høvdu einki við uppskotið at gera, sigur hann og leggur afturat at nevndin fer at taka málið upp*

Sveinur Tróndarson

Tað er synd at siga, at formaðurin í Búskapar- og løgfrøðingafelagnum er bergtikin av hvøssu atfinningunum hjá landsstýrismanninum í fiskivnnumálum móti uppskotinum hjá Búskaparráðnum.

– Eg haldi, at tær eru heilt burturvið ósakligar. Har var ikki ein faklig viðmerking til uppskotið, men ein persónlig niðurger av limunum í Búskaparráðnum, sum vóru lagdir undir ikki at tora at seta sítt kristna navn undir uppskotið. Harafturat valdi landsstýrismaðurin at niðurgera útbúgvingina við at kalla teir fyri logar og annað gott, sigur Bergur Berg.

**Óheft ráð**

Formaðurin í BLF staðfestir, at Búskaparráðið er eitt politiskt óheft ráð, sum er sett av landsstýrinum. Hetta ráð skal koma við kjakuppleggum, sum ikki eru heft av tí til ta tíðina sitandi landsstýrið.

Tí heldur hann tað eisini verða løgið, at landsstýrismaðurin á ein slíkan hátt húðflettir uppskotið uttan í veruleikanum at hava givið tí eina sakliga viðgerð.

– Var ætlanin at ráðið skuldi koma við politiskt rættum ráðum, so skuldi tað ligið í arbeiðssetninginum hjá ráðnum, og so loyvi eg mær at ivast í, um tað hevði borið til at manna ráðið, sigur Bergur Berg.

Hann vísir á, at landsstýrismaðurin vildi hava at ráðið hevði spurt seg fyri hjá vinnuni um hon kundi taka undir við uppskotinum.

– Tey, sum sita í Búskaparráðnum eru vald har av síni fakliga kunnleika og ikki tí at tey eru í almennum starvi og tí er talan um eitt serliga grovt álop á teirra fakliga stoltleika, sigur Bergur

**Taka málið upp**

Vit spurdu tí Berg um BFL ætlar sær at gera nakað við málið.

– Nevndin fer sjálvandi at taka málið upp. Vit viðgera málið í løtuni, men hvussu vit velja at fara fram er ikki greitt beint í løtuni, sigur Bergur, sum heldur at støðan er serliga álvarslig tá talan er um ein landsstýrismann, sum fremur slíkt álop.

Landsstýrismaðurin er umframt at vera fakligur ráðharri eisini fyrisitingarligur ráðharri og tí hevur hann eina skyldu, sum røkkur longri enn um talan var um ein vanligan tingmann.

– Og tað er ikki fyri at rættvísgera, at tingmenn av órøttum leggja á embætisfólk, men tað hevur eina serliga vekt tá tað er ein landsstýrismaður, sum loypir á. Politikkararnir hava biðið um at fáa uppskot til kjak og tað hava teir fingið. Men ístaðin fyri at viðgera uppskotið húðfletta teir persónarnar, sum hava gjørt uppskotið, og tað er heilt burturvið, sigur formaðurin í BFL.



*Bergur Berg, formaður í BFL*

*Hermann Oskarsson:*

# Taki undir við tankanum í uppskotinum

*Í Dagblaðnum mánadagin varð Hermann Oskarsson lagur undir at vera upphavsmaður til uppskotið hjá Búskaparráðnum um fiskidagabanka, men tað er hann ikki. – Men eg taki undir við tankanum, sigur hann*

Sveinur Tróndarson

– Tað er ein heiður fyri meg, at fáa ábyrgdina av uppskotinum, men eg eigi tað tíverri ikki, sigur Hermann Oskarsson, sum í Dagblaðnum mánadagin, saman við Kjartani Hoydal, verður lagdur undir at verða upphavsmaður til uppskotið hjá Búskaparráðnum.

Hann er errin av at vera lagdur undir tað, tí hann tekur undir við tankanum aftanfyri uppskotið.

– Men talan er jú bert um eitt uppskot, sum lítið kjøt er á enn, og tí ber illa til at siga so nógv meira um tað, men eg eri samdur við tankanum.

Tann sum hevur fylgt eitt sindur við í hesum kjakinum veit, at tað er Marner Jacobsen, stjóri í Sparikassanum, sum av fyrstan tíð hevur lagt uppskotið fram. Tað gjørdi hann í Ábyrgdaranum fyri umleið tveimum árum síðani, greiðir Hermann Oskarsson frá.

**Lítið sømiligt**

Sjálvur heldur Hermann Oskarsson tað vera lítið sømiligt fyri landsstýrismannin í fiskivinnumálum, at hann á slíkan hátt niðurgerð arbeiði hjá Búskaparráðnum.

– At Dagblaðið hevur slíkan framburð er okkum ikki ókent, men at eg haldi at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum átti at víst størri tign enn so, sigur Hermann.

Av tí at uppskotið, sum nevnt, hevur verið frammi fyrr, heldur hann tað í grundini vera løgið, at tað ikki skapar øsing fyrr enn nú, knøpp tvey ár eftir at tað fyrstu ferð varð lagt fram.

*Men er hetta ikki við til at undirgrava Búskaparráðið, tá ein landsstýrismaður soleiðis húðflettir tað alment?*

– Eg haldi, at tað skaðar líka so nógv hansara egna starv og hann sjálvan, sum tað skaðar metingina av Búskaparráðnum, sigur Hermann Oskarsson.

**Óheft kjakupplegg**

Hermann Oskarsson er annars ikki av tí fatan, at ráðgevarar landsins eiga at vera friðaðir tá teir eru »til arbeiðis«.

– Teir, sum sita í Búskaparráðnum, ferðast í veruleikanum í politiska innarkringinum og tá er vandi fyri, at teir fáa eina harða viðgerð. Tí haldi eg ikki, at teir eiga at vera sartir. Men har frá og til at gera persónliga niðursetandi viðmerkingar av teirra uppskotum er meira eitt dømi um at onkur er politiska óbúgvin, heldur Hermann Oskarsson.

Annars heldur hann at uppskotið frá ráðnum kom í júst røttu løtu, tí stutt eftir at uppskotið var lagt fram frættust tíðindini úr Íslandi, at ein partaeigari hevði selt sín part í íslendska partafelagnum Samherji, fyri ikki minni enn 300 mió. krónur.

– Pengar, sum hann hevur fingið frá tí almenna, sigur Hermann.



*Hermann Oskarsson, stjóri á Hagdeildini*



# Kalsberg sent Nyrup fundarboð viðvíkjandi ríkisrættarligu støðuni

*Í gjár sendi løgmaður forsætisráðharranum skriv, har hann biður um fund millum landsstýrið og donsku stjørnina í mars, har uppskot landsstýrisins um millumlanda sáttmála er á skránni, eins og tíðarætlan og mannagongd*



*Anfinn Kalsberg, løgmaður, vónar, at danski forsætisráðharrin hevur stundir at koma á fund um ríksrættarlig viðurskifti millum 13. og 24 mars í ár. Bræv var sent forsætisráðharranum í gjár*

Dagfinn Olsen

Anfinn Kalsberg, løgmaður, sendi í gjár Poul Nyrup Rasmussen, forsætisráðharra, bræv. Í brævinum greiðir løgmaður frá, at undir vitjan Poul Nyrups í august í fjør varð avgjørt, at tá politisku og umsitingarligu fyrireikingarnar vóru komnar undir land, skuldu skuldi løgmaður seta seg í samband við forsætisráðharran fyri at fáa í lag fund.

Málið er nú í uttanlandsnevndini og landsstýrið er komið so mikið langt við fyrireikingunum, at løgmaður í brævinum heitir á Nyrup, um at fundur verður millum landsstýrið og donsku stjórnina í mars í ár.

**Finna semju**

Løgmaður hevur á skránna fyri fundin sett 3 punkt.

Landsstýrið leggur fram uppskot um millumlandasáttmála. Eisini kemur landsstýrið við uppskoti um tíðarætlan og ymsum um, hvussu samráðingarnar fara fram.

Landsstýrið vil fegið, at semja fæst á fyrsta fundinum um hetta síðsta. Tað vil siga punkt 2 og 3, sum á donskum eru soljóðandi: forslag til tidsplan og praktiske forhold for forhandlingsforløbet og forslag til retningslinier for forhandlingerne.

**Í Føroyum ella í Danmark**

Í brævinum til forsætisráðharran vónar løgmaður, at Poul Nyrup Rasmussen hevur møguleika at seta tíð av til fund í Føroyum ella í Danmark millum 13. og 24. mars 2000.

Brævið frá løgmanni til forsætisráðharran var sent klokkan 13 í gjar, tann 8. februar 2000.



LØGMANSSKRIVSTOVAN

"Under statsministerens officielle besøg på Færøerne i august 1999 diskuterede statsministeren og lagmanden spørgsmålet om de forestående suverænitets forhandlinger.

I denne forbindelse aftaltes der, at så snart Færøernes Landsstyre havde foretaget de nødvendige administrative og politiske forberedelser, ville lagmanden tage kontakt til statsministeren med henblik på at aftale parternes første møde. Dette er også i overensstemmelse med aftalen af juni 1998.

Sagen behandles nu i lagtingets udenlandsudvalg, og Landsstyret er nu nået så langt med forberedelserne, at jeg vil anmode statsministeren om, at der afholdes et møde mellem det færøske landsstyre og den danske regering i marts 2000.

Lagmanden vil på mødet præsentere:

- landsstyrets oplæg til traktat
- forslag til tidsplan og praktiske forhold for forhandlingsforløbet
- forslag til retningslinier for forhandlingerne

Landsstyret ser gerne, at parterne ved dette første møde finder en fælles forståelse for punkt to og tre.

Forhåbentlig har statsministeren mulighed for at afsætte tid til møde, i Danmark eller på Færøerne, i perioden mellem den 13. og 24. marts. Jeg ser derfor frem til at høre fra dig."

Tinganes, hin 8. februar 2000

Løgmansskrivstovan

TINGANES • POSTSMOGA 64 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 35 10 10 • TELEFAX 35 10 15 • E-MAIL: LMS@FL.FO

»Under statsministerens officielle besøg på Færøerne i august 1999 diskuterede statsministeren og lagmanden spørgsmålet om de forestående suverænitets forhandlinger.

I denne forbindelse aftaltes der, at så snart Færøernes Landsstyre havde foretaget de nødvendige administrative og politiske forberedelser, ville lagmanden tage kontakt til statsministeren med henblik på at aftale parternes første møde. Dette er også i overensstemmelse med aftalen af juni 1998.

Sagen behandles nu i lagtingets udenlandsudvalg, og Landsstyret er nu nået så langt med forberedelserne, at jeg vil anmode statsministeren om, at der afholdes et møde mellem det færøske landsstyre og den danske regering i marts 2000.

Lagmanden vil på mødet præsentere:

- landsstyrets oplæg til traktat
- forslag til tidsplan og praktiske forhold for forhandlingsforløbet
- forslag til retningslinier for forhandlingerne

Landsstyret ser gerne, at parterne ved dette første møde finder en fælles forståelse for punkt to og tre.

Forhåbentlig har statsministeren mulighed for at afsætte tid til møde, i Danmark eller på Færøerne, i perioden mellem den 13. og 24. marts. Jeg ser derfor frem til at høre fra dig.«

Tinganes, hin 8. februar 2000

Løgmansskrivstovan

# Útflutningsparturin vaksandi

*Hydro-Tech á Eiði er virki í stórari menning. Í gjár reistu teir nýggju framleiðssluhøllina og 20% av framleiddu besløgunum til aliringar fara til útflutnings og útflutningsparturin er vaksnandi*

Dagfinn Olsen

Hydro-Tech á Eiði er stórt arbeiðspláss og hevur stóran týdning fyri bygdina og grannabygdirnar. Ummleið 2/3 av teimum 23 fólkunum á lønarlistanum hjá Hydro-Tech eru búsitandi á Eiði.

**Nýggj høll**

Umframt at framleiða besløg til aliringar, ger Hydro-Tech eisini bátar og tvíkiljur til alivinnuna.

Í gjár reistu teir nýggju framleiðsluhøllina, sum er keypt brúkt úr Danmark.

– Høllin hevur stórar fyrimunir við sær, tí arbeiðast kann munadyggari, sigur Jørmund Foldbo.

Høllin er 1200 fermetrar og skal t.d. nýtast til umvæling og framleiðslu av bátum.

Sum er, húsast Hydro-Tech í trimum húsum. Teir fegnast, nú útlit eru fyri munandi betri arbeiðsumstøðum.

**Útflutningur**

Hydro-Tech framleiðir millum annað besløg til aliringar.

20% av hesi framleiðslu fer til útflutnings. Tað mesta fer til Noregs, men arbeitt verður við at kanna aðrar marknaðir eisini.

Eisini bátarnir fara møguliga at gerast útflutningsvøra. Áhugi er í Noreg og í Skotlandi.

Tveir bátar eru gjørdir og tveir standa í ger, so væntandi kemur talið upp minst 5 í ár.

Stóra arbeiðsplássið hevur stóran týdning fyri bygdina.

Jørmund Foldbo sigur, at ikki er óhugsandi, at enn fleiri fólk fara at starvast á Hydro-Tech, um útflutningurin, og harvið virksemið, veksur.

Umfarmt framleiðslu til alivinnuna, so hevur Hydro-Tech eisni ymisk arbeiði innan fiskivinnuna.

Talan er í stóran mun um alt vanligt arbeiði og mest eru tað skip og bátar, sum hava heimstað á Eiði, sum talan er um, sigur Jørmund Foldbo.



*Umframt at framleiða besløg til aliringar, ger Hydro-Tech eisini bátar og tvíkiljur til alivinnuna*
***Mynd: Jens Kr. Vang***